Lýsingartorgið

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
✓ privatar lýsingar
✓ í mesta lagi 40 orð
✓ bert ein lutur í hvørjari lýsing
✓ hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
✓ frá fyritøkum og virkjum
✓ fleiri enn 40 orð
✓ søluvirði oman fyri 20.000 kr.

tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
50,- kr. + MVG hvørja ferð:
✓ lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«
✓ Bill. merktar

Akfør

15" FELGUR
4 felgur til sølu, hava verið brúktar til Ford Mondeo.
Tlf. 456667

BLÁUR DAIHATSU
Charmant, árg. 08/86, 160.000 km. Til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 447966

BMW
frá '87, nýlakeraður, nýsýnaður, í góðum standi, koyrir sum ein dreymur, 15.000 kr.
Ring 321026, Dánjal Jákup

CITROEN BX
árg. 82 til sølu. Ring og hoyr meira.
Tlf. 212174

COROLLA 1.6 GTI
til sølu. Hevur sportfelgur 15". Prísur 12.000,-
Tlf. 319501 aftaná kl. 18
Arb. 313040

FORD TRANSIT
vørubilur, 85 HK, hálvhøgt tak Ontario Blue, árg. 95, koyrt 54.000 km til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 455510 ella 220366

DAEWOO LANOS 1.6
til sølu vegna flyting. Hevur alufelgur, el-rútar, cd-spælara og fýra nýggj heilársdekk á felgum fylgja við, árg. 6/99, koyrt 16.000 km. Prísur: 125.000,-
Tlf. 22 10 36

DAIHATSU CHARADE
við skaða, til sølu fyri 3.000,00 kr.
Tlf. 441680

DAIHATSU ROCKY
turbo, árg. 88, hevur plátur, bíliga til sølu.
Tlf. 332737 ella 210737

DAIHATSU ROCKY EX
4x4 árg. 84 til sølu fyri 5000 kr.
Tlf. 33 20 64
best eftir kl. 18

EIN
brennistofpumpa til Scania 142 til sølu.
Tlf. 422123

FORD ESCORT
til sølu fyri 3000 kr. Píkadekk fylgja við.
Tlf. 44 19 50

FORD ESCORT
1.3, árg. 1984, best egnaður sum eykalutir, bíliga til sølu.
Tlf. 447531 ella 447492

FORD ORION
árg. 89, hevur nýggj píkadekk, til sølu.
Tlf. 36 19 60 eftir kl. 19.00

FORD SIERRA
Cosworth til sølu. Bilurin er árg. 11/91, gulur, sera snøggur 270 HK nýggj dekk, felgur 225/45-16 í sera góðum standi.
Tlf. 374660 ella 281668

FORD SIÉRRA
bilur til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 424145

GALV.
viðfestisvognur við øllum hentleikum. Galv stativ runt um og rampu aftan. Eginvekt kg. 150. Mesta last kg. 600. Heildarvekt kg. 750.
Tlf. 28 21 16

GOLF 1.6
árg. 1987, til sølu.
Tlf. 221021

GOLF CL 1.6
Turbo diesel, árg. 1991 til sølu. Hevur koyrt 186.000 km harav 160.000 í Týskland. Alt er í besta standi.
Tlf. 214470 eftir kl. 15.30

HONDA CIVIC
1.5 GL árg. 87, sær hampuligt út og koyrt gott.
Tlf. 315734

HONDA CIVIC
Ein sjey ára gamal Honda Civic koyrt 95.000 km 16" sportfelgur. Senkisett, stereoanlegg við discbox, forsterkari 4x250 w hátalarir 2x200 w, 2x80w. Ring um nærri boð á
tlf. 316370

JEEPUR TIL SØLU
Nissan Patrol 2.6 Turbo diesel, árg. 87, sýnaður jan. 2000.
Ring 312987 aftaná kl. 17

MAZDA 323
4 felgur við brúktum píkadekkum, bíliga til sølu.
Tlf. 456146

MAZDA 323
I F 1.6 grønur, model v/ klapplyktum, árg. 93. Bilurin sær gott út og er sera økonomiskur. Til sølu ella í býti við diesel bil.
Tlf. 283902

MAZDA 626
Árg. 84, koyrir væl, til sølu fyri 7.000 kr.
Tlf. 455543, eftir kl. 17.30

MITSUBISHI
sport Galant GLSI, árg. 9/92 við allari nútímans útgerð til sølu.
Tlf. 210568

MITSUBISHI
Galant TD 1800, bilurin er í sera góðum standi. Motorurin hevur koyrt uml. 100.000 km. Til sølu ella í býti við minni bil.
Tlf. 317376

MITSUBISHI GALANT
turbo diesel, 1800 í góðum standi, ongan rust, til sølu við sportfelgum og anlegg (diskbox).
Ring 21 43 81

MITSUBISHI LANCER
1500, st.car. árg. 86, selist sum eykalutir, prísur 2000 kr. Koyrir, hevur plátir, og við eini kerligari hond hevur tú eitt væl nýtiligt akfar.
Tlf. 441100 og 281044

MITSUBISHI PAJERO
exe, stutt model, árg. 1988, koyrt 125.000 km, til sølu fyri 45.000
Tlf. 31 02 54

MITSUBISHI PAJERO
2.3TD. Er í góðum standi, sýnaður 22.11.99 og setur aftan, eykalutir fylgja við.
Tlf. 21 15 43

MOTORUR TIL SØLU
Dieselmotorur Toyota 3.B 3.5L passar til Landcruiser ella Dyna. Toppstykki klovi, km. 100.000 bíliga til sølu.
Tlf. 332025 ella 214025

NISSAN
Pick Up diesel. árg. 87, til sølu.
Tlf. 37 38 04

OPEL ASCONA 1,6
Árg. 88, sýnaður í des. ´99, hevur koyrt 163.000 km. Prísuppskot: 20.000 kr.
Tlf. 318086 best kl. 8-12 ella 18-23

OPEL OMEGA 2000I
árg 89, koyrt 100.000 km, aut. gear + alla el-útgerð, fløguspælari kann fylgja við. Í sera góðum standi, til sølu.
Tlf. 0045 23419463

OPEL REKORD SEDAN
2.0, árg. 87, til sølu fyri 4000 kr. Koyrir, men hevur ikki plátir.
Tlf. 448264

PÍKADEKK
3 stk. pigdæk 155x13, 1 stk. 165x13.
Tlf. 317714 bedst efter kl. 18.00

ROVER 214 SI
103 HK árg. 99, 4 hurðar, hevur koyrt 4.500 km. Hevur m.a. el-rútar, fjarstýrt centrallás, airbags og bil alarm. Boð ynskist.
Tlf. 332404

SPORTFELGUR TIL SØLU
Passar til Peugeot 205 og teir nýggju 306. Eitt ára gamalt sett fyri 4500 kr.
Ring 31 89 13 aftaná kl. 18

STOPP!!!
Ein Ford Sierra árg. 84 og fýra felgur 15", fýra heilársdekk 165 R 13" og ein CD spælari í Pioneer og eitt sett av hátalarum 200 watt stk. er bíliga til sølu.
Tlf. 422358
P. S. Bilurin er sýnaður í 1999

SUBARU
bilur, 4 wd st.car. við sleipikróki, góðum radio, sýnaður í apríl 99, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 421346

SAAB 90
árg. 87, bilurin er sýnaður síðst í 1999, til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 421649 ella 211649

SAAB 900i
Svartur SAAB 900i, nýsýnaður, í góðum standi, vælhildin, hevur sóltak og sportfelgur, er at síggja hjá Sp/f John P. Vilhelm, Yviri við Strond 4.
Tlf. 315054

TOYOTA CARINA E
2.0 SLI, árg. 94, km 75.000.
Tlf. 455291 ella 456231

TIL SØLU
Opel Vectra Turbo Diesel árg. 7/98 til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 282744

TIL SØLU
Ford Orion árg. 85, hevur plátur, koyrir, góðir sum eykalutir, fyri 1.500 kr.
Tlf. 312880

TIL SØLU VEGNA FLYTING
Myrkabláur Mazda 323 1,5 Hatchback, árg. 1. okt. 98, vælhildin, roykfríur, sera ódýrur í benzin, 3 hurðar, einki brek yvirhøvur, koyrt 15.000 km.
Tlf. 314213 & 315622

TOYOTA AVENSIS
árg. 4/98 koyrt 30.000 km. hevur stereoanlegg v/cd-spælara til sølu.
Tlf. 457195 ella 456387

TOYOTA CAMRY
2.5i V6, (til sølu um hóskandi boð fæst) 16" og 15" felgur fylgja við. Bilurin sær út sum nýggjur, ring og spyr.
Tlf. 444246 arb. ella 444097 eftir kl. 17, Signar

TOYOTA CARINA
1.6 XLI til sølu, árg. 4/96, koyrt 38.000 km. Bilurin er í góðum standi.
Tlf. 217661

TOYOTA CELICA
1.6 GTI. Twin Cam til sølu. Bilurin er svartur, nýlakeraður og hevur alt eyka útstýr. Hevur hetta áhuga so ring:
Tlf. 371932

TOYOTA COROLLA
Liftback ae/80 frá nov. 1984. 1600 motor, hevur koyrt 145.000, hevur plátur enn. til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 441446 ella 444738

TOYOTA HIACE
diesel, árg. 88, motorurin hevur koyrt uml. 160.000 km. til sølu fyri kr. 12.000,- ella hægsta boð.
Tlf. 444787 ella 287990

VETRARDEKK TIL SØLU
Nýggj lamel/píkadekk, flest allar støddir, til sølu.
Tlf. 282691 ella 317691

YMISKT
Deilir til ein Honda Accord árg. 87, ynskist bíliga til keyps, sum t.d. svingarmar, stoytdoyvarar og tílíkt.
Tlf. 315965
eftir kl. 17

Amboð

ALUMINIUMSSTILLADS
til sølu. Sera vælegnað til innandura og uttandurabrúk, kann deilast í tvey, tvey rullistativ, longd 240, br. 120, hædd 11 m. kann deilast, eitt uppá 6 m. og eitt uppá 5 m.
Tlf. 31 76 36 eftir kl. 17 ella leygar- og sunnudag

DEKK TIL STILLADS!
Passa til Hunnebeck BOSTA stillads. Plankadekk 35x250 cm. 66 stk., verður selt samlað fyri 10.000,-
Tlf. 212600
best eftir kl. 18.00

FORSKALLINGSFORMAR
TEKKO.
11 stk. 90x90 cm.
2 stk. 60x90 cm.
2. stk. 45x90 cm.
3 stk. 30x30 cm.
2x2 stk. hjørnir. Verður selt samlað fyri kr. 6.000.
Tlf. 21 26 00, eftir kl. 18

ALUMINIUMSTIGI TIL SØLU
Skjóti/vinarstigi 7,9 metur langur, prísur: 375 krónur.
Tlf. 31 60 99

LADEAPPARAT
til sølu. »Axel Åkerman« max. ladestreym 9 ampere, kann lata upptil 15 bly-akkumulatorceller (30 V-AKK) prísur: 300 kr.
Tlf. 31 60 99

TRAPPUSTIGI
til sølu. 5 trin aluminiumstigi sum nýggjur. Prísur: 100 kr.
Tlf. 31 60 99

YMISK AMBOÐ
til sølu. Til dømis: 1 AEG Rundsag 710 W. 1 Metabo Borimaskina 400 W. Ein nýggj trillubør v/spakum, ein skrúvustikka, ymist annað, selist fyri avheintingarprís.
Tlf. 31 60 99

Arbeiði

ARBEIÐI SØKIST
16 ára gomul genta søkir arbeiði aftaná skúlatíð. Alt hevur áhuga.
Tlf. 319779 eftir kl. 16

ARBEIÐI YNSKIST
14 ára gamal raskur og álítandi drongur ynskir arbeiði eftir skúlatíð, í Klaksvík.
Tlf. 457224 eftir kl. 16

ARBEIÐI YNSKIST
15 ára gomul genta søkir arbeiði. Alt hevur áhuga, er von at passa børn.
Tlf. 311263

HEY!
Eg eri ein 18 ára gomul genta, sum søki arbeiði. Eg havi arbeitt í handli og havi vaskiarbeiði. Hevur tú brúk fyri eini hjálpandi hond, so ring á
tlf. 221019

HÚSASMIÐURIN
Ný-, um- og uppibygging, innrætting, umvæling, bjálving, tætting, viðgerð av vindeygum o.a. uttandura timbur og jarn. Hjálpir við umsókn um bjálvingarlán fyri pensionistar.
Húsasmiðurin Spf.
Tlf. 36 19 77
um alt landið

REINGERÐ
Um nakar hevur brúk fyri hjálp í húsinum.
Ringið tlf. 310171

Barnaútgerð

BARNA
koyristólur, gráur við kalesju, til sølu fyri 900 kr.
Tlf. 315342

BARNASTÓLUR
Emma, ljunga, barnastólur, myrkabláur, vælhildin, til sølu.
Tlf. 375071

BARNAVOGNUR
Vælhildin myrkabláur Simo barnavognur við lyft og skiftitasku við passar til. Íroknað madrassur og regnslag. Brúkt til eitt barn.
Tlf. 320211

BILSTÓLUR
av merkinum TUV Universal 18 kg. góðkenning E4 til sølu fyri 300 kr.
Tlf.316016 ella 214884

HÁLVHØG BARNASONG
v/forhangi std. 70x140 til sølu fyri 1.500 kr. Nýprísur 2.400 kr. er lítið og onki brúkt.
Tlf. 310068

HYGG HER!
Myrkabláur koyristólur í góðum standi, til sølu. Bert brúktur til eitt barn.
Tlf. 319460, Anna-Maria

KØBES
Trip Trap-stole og store barnevogne.
Dagstovnurin á Oyri
tlf. 422552

LÍTIÐ BRÚKT
rimasong úr træ v/puslíplátu, skuffu og madrassu til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 317078

PUSLIBORÐ?
Er tað nakar, ið hevur eitt pusliborð at hanga upp á veggin at selja okkum?
Tlf. 312934

SILVER CROSS
Bláur barnavognur við madras og regnslag, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 318133

SIMO KOMBI
Tvíburða barnavognur í góðum standi selist fyri hálvan prís.
Tlf. 312720 ella 448431

TIL SØLU
Tvillingaklappvognur 1 1/2 ára gamal, lítið brúktur, sum nýggjur, til sølu fyri 1.750 kr, nýprísur 2.500 kr.
Tlf. 310068

WEEKEND SONG
bert brúkt tríggjar ferðir, ca. eitt ára gomul, til sølu fyri 350 kr.
Tlf. 316717 aftaná kl. 17

YMISK
barnaútgerð til sølu.
Tlf. 45 58 10
ella 45 72 84

Barnaansing

BARNAANSING
Vit eru ein 6. flokkur, ið skal til Danmarkar. Vit vilja tí fegin ansa børnum, at vinna okkum pening til ferðina. Vit duga at skifta blæum, eisini ganga vit fegin túr við hundinum. Kostnaður kr. 50,- um tíman.
Ring á tlf. 316968
ella 215044

GENTA/KONA
søkist at ansa 8 mðr. gomlum barni mánadagfríggjadag frá uml. kl. 8.00-16.00.
Tlf. 310612

SØKT VERÐUR
eftir gentu/kvinnu at ansa eftir 6 mðr. gomlu Ly mánadag-hósdag frá 10. februar.
Vinaliga ring 312991

Bátaútgerð

BÁTUR TIL SØLU
Starlet 29 v/Volvo Penta motori til sølu.
Tlf. 42 44 50

FRAMBYGDUR
føroyskur bátur við 40 hk Tornycraft, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 421330

HYDROFOR KANN AVHEINTAST
Vit hava ein hydrofor standandi. Tangin er gjørdur á Jarlsø Fabriker, Tønsberg í 1983. Hann er 300 l, tolir 10kg/cm2, plast innan. Pumpan er frá Bryne Mek. Verksted, MB 2745, Nr3032. Hann verður drivin av einum Siemens elmotori, 1375/m, 0,37kW. Skipanin er lítið brúkt.
Ring 317012 aftaná kl. 18

MAGNETKOBLING
24 V 2 spor A reimar til sølu.
Tlf. 457114

PÁHANGSMOTORUR
Johnson 5 HK, til sølu fyri kr. 5.000.
Tlf. 31 50 62

SLUPPUNGI
Sluppungi til sølu.
Tlf. 371634

SNELLIR
Fýra stk. hydro-elektroniskari snellir, 2 stk. hydrauliskar snellir, 10 stk. 300 l. isoleraðir fiskakassar.
Tlf. 31 63 38

STIGFJORD
Stigfjord 28" til sølu. Sera væl útgjørdur.
Tlf. 444632

Bingo

BÁRUBINGO
Stórt bárubingo verður í Skálanum mánakvøldið 7. feb. kl. 19.30. Hópin av góðum vinningum so sum: ísl. kjøt, sodavatn, fleskasteikir, ur, kosmetik, seyður og mangt, mangt annað. Til fulla plátu 1/2 ísl. krov + 1 ks. sodavatn. Á Báruhjólinum er møguleiki at vinna 13.000 kr., ein telda, sum er klár at seta til Internet, olja, borðbátur, stereoanlegg o.m.a. Ialt 60 vinningar. Føroya flestu og bestu vinningar.
Báran

BASARUR Í KVÍVÍK!
7. mai fara vit aftur at hava basar. Tí heita vit á tykkum um at hugsa um okkum. Vit vóna, at undirtøkan verður eins góð sum seinast.
K.S.R.
Glæman
Skótarnir

BINGO
Gott matbingo verður í Framtíðini í Vági mánadagin 7. februar kl. 19.30. Nógvir góðir vinningar.
2 S á
Suðuroyar Miðnámsskúla

BINGO
verður í Havnar Klubba sunnudagin 6. febr. kl. 19.
Havnar Klubbi

BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum sunnudagin 6.2. kl. 16.00. Nógvir góðir vinningar, so sum gávukort 1500 kr. 1000 kr. olju, gávukort 500 kr. gávukort 400 kr. 1/2 krov og mangt annað. 12 plátur 100 kr.
99 Q í Hoydølum

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 6.2. kl. 16.00. Full pláta 400 kr. á lutaseðli. Gávukort: 1 á 1000 2 á 500 kr. Eykaspælið 1400 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 6.2. kl. 16.00. Full pláta 400 kr., á lutaseðli gávukort, 1 á 1000 kr, 2 á 500 kr. Eykaspælið 1400 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

GOTT BINGO
verður í Bygdarhúsinum í Hósvík leygarkvøldið 12. feb. kl. 19. Nógvir góðir vinningar. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Eykaspælið nú gávukort á 1.500 kr. Full pláta 400. kr. 10 lutir á lutaseðlinum. Øll eru vælkomin. Tey, ið fáa bingo innan 10 tey fyrstu tølini fáa 500 kr + vinningin.
Bygdarfelagið Varðin

GOTT BINGO
verður í TB-húsinum leygardagin 5. februar kl. 17.00. Høvuðsvinningur á lutaseðli 2x500 kr. Annaðhvørt bingo 300 kr. og annaðhvørt 1/2 krov.
Tvøroyrar Bóltfelag

SAMLJÓÐ, SKOPUN
Vár-eydnuhjól verður 6. mai. Lutir verða móttiknir við tøkk.
Nevndin

Burturm. / funnið

UR FUNNIÐ
Gullúr funnið í W. U. Hammershaimbsgøtu yvir av Ellisheiminum, mánadagin 31.1. Urið er eitt Omega de ville, damu ur.
Tlf. 312187

Býli

2 VER. ÍBÚÐ
í Ærhus C til framleigan frá 1.3.2000 til 1.6.2000. Møguleiki er fyri leingjan.
Ring 0045 86765160 ella 0045 20470915 Rannvá

ELDRI
høvuðsumvæld sethús í Sørvági, matrikul nr. 85, til sølu um hóskandi boð fæst. Húsini eru í trimum hæddum, kjallari, hvør hædd 56 ferm. miðhædd: baðirúm/wc, gongd, køkur og stova. Loft: fýra kømur, gongd, brúsa/wc. Kjallari, úthús, vaskirúm. Grund 888 ferm. Í barnavinarligum umhvørvi.
Tlf. 332404

HJÁLP!
Vit eru friðarligt ungt par, ið tørvar íbúð í Havn skjótast gjørligt. Um nakar kann hjálpa okkum, so vinarliga ringið
tlf. 317271

HÚS ELLA ÍBÚÐ
ynskist til leigu í Havn, Hoyvík ella á Argjum skjótast gjørligt. Vit fara væl um.
Tlf. 372037

HÚS Í KVÍVÍK
Til leigu í vikuskiftinum, allir hentleikar, gott útsýni yvir bygdina.
Tlf. 447031

HÚS Í NORÐRAGØTU TIL SØLU
Stór og góð sethús í barnavinarligum umhvørvi til sølu. Sera gott útsýni. Møguliga kunnu smærri sethús ganga inn í keypið.
Tlf. 442164
best eftir kl. 17

HÚS Í VÁGI TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst . Matr. nr. 348 o Skólabeiti. Hús 120 fermetrar kjallari 70 fermetrar innrætta. Grundøkið 647 fermetrar. Byggiár 1980.
Tlf. 373611

HÚS TIL LEIGU
í Øravíkarlíð. 2.000 kr. mðr.
Tlf. 004528265638 Heri

HÚS TIL SØLU
Hús á Garðavegnum, Klaksvík, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 455291
ella 456231

HÚS YNSKIST TIL LEIGU
í Klaksvík skjótast gjørligt.
Ringið 457096

HÚS, ÍBÚÐ
ella stórt verilsi ynskist til leigu í Kaldbak skjótast gjørligt.
Ring 32 10 26 millum kl. 18 og 19

HÚS, ÍBÚÐ
ella stórt verilsi ynskist til leigu í Kollafirði skjótast gjørligt.
Ring 32 10 26 millum kl. 18 og 19

HYGG HER
um nakar hevur eini hús ella eina íbúð at leiga út, vinaliga ring
217768 ella 317500
og spyr eftir Allan

HYGG HER
Um tað eru tvær ungar gentur, ið mangla innivist, so ringið
tlf. 310171

HØLIR TIL LEIGU
í Miðbýnum. Fyrr (FC-Búðin) umleið 100 ferm. við gosvatni.
Tlf. 315438 & 283864

ÍBÚÐ
í Kambsdali til leigu, ca. 90 kvm. við vaskirúm og frystiboks.
Áhugaði ringið 444231

ÍBÚÐ Í HAVN
Ein íbúð í Havn er til leigu frá hálvum februar. Ca. 40 kvm. stova-kamar-køkur, baðirúm, egin inngongd, prísur minimum 3.500 kr. pr. mðr. 1 mðr. depositum.
Bill.mrk. 25767

ÍBÚÐ Í VESTURBÝNUM
í Havn til leigu í hálvt ár frá 7. februar.
Tlf. 313570

ÍBÚÐ TIL LEIGU Í HAVN
Stova, køkur, kamar wc og gongd, til leigu til einlig fyri 2.500 v/ljós og hita.
Bill.mrk. 853767

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu. Vegna plásstrot, søkja vit eftir stórari íbúð. Skal hava tvey kømur. Vinarliga ringið á
tlf. 320561

ÍBÚÐ YNSKIST
32 ára gomul kvinna leitar eftir íbúð í Havn, helst nær miðbýnum.
Tlf. 310086 ella 316226

ÍBÚÐ YNSKIST
Einlig kvinna ynskir eina íbúð í Klaksvík til leigu skjótast gjørligt, fari væl um.
Bill.mrk. 830767

ÍBÚÐ YNSKIST Í HAVN
Vit eru eitt friðarligt par úr Vági, sum hava okkara gerandisdag í Havn. Vit mangla eina íbúð skjótast gjørligt.
Vinarliga ring 282278 ella 373390

STÓRT VERILSI
við egnari inngongd, atgongd til wc/brúsu og tekøk, til leigu úti við Strond.
Billmrk.: 762784

TIL LEIGU
Eitt kamar til leigu í Keypmannahavn í trý-rúms íbúð við Ørresundskollegiet og Amager Centrið og nógv bus-forbindilsir. Ca. 18 kvm. fyri 2.200,- kr. pr. mð.
Tlf. 32 96 36 98

Bøkur

KOSTAR EINKI
Stór pappeskja við dansk-um ævintýrbókum. Heftir og bøkur til sjúkrasystra útbúgving eisini, fáast við at heinta eskjuna.
Tlf. 316878 aftaná kl. 15

Dansur

KLAKSVÍKAR DANSIFELAG
Veitsla saman við Tvøroyrar Dansifelag verður í Skálanum 19.2. kl. 19.00. Tekningarlisti liggur frammi dansikvøldini. Tekning annars hjá nevndini.

Dýr

EIN SERA
fittur svartur og hvítur kettlingar fæst við at ringja á tlf. 312619,
bert til djóravin

HEY
Vit hava ein ógvuliga fittan kettling. Hann er svartur og hvítur. Hann er reinligur, kelin og sum sagt fittur.
Ring tlf. 316166

KETTLINGAR
Tríggir kettlingar verða latnir djóravinum.
Tlf. 217430
ella 457654

KETTLINGUR
Svartur kettlingur 10 vikur gamal verður latin djóravini.
Tlf. 373465
eftir kl. 15

RAVNUR
Ein livandi ravnur ynskist.
Tlf. 456662

RYSSIR
Tvær ryssir 5 og 11 ára gamlar til sølu.
Tlf. 332737
ella 210737

Fundir

AÐALFUNDUR FELAGSINS
verður leygardagin 12. feb. kl. 13.00 í MBF húsinum. Skrá sambært lógum felagsins. Við á fundinum luttekur Odmar Færø, barnalækni.
Føroya Astma-/
Allergifelag

ÁRSAÐALFUNDUR
felagsins verður 13.2.2000 kl. 16.00. Eisini verður tosað um Hetlandstúr í summar.
H.S.R.

Eykaaðalfundur
Lýst verður til eykaaðalfund leygardagin 5. feb. kl. 14.00 í Ullvøruhúsinum (Kongagøta 11). Skrá sambært reglugerð felagsins.
Unga Tjóðveldið

FIBROMYALGI
Leygardagin 5. feb. kl. 14. verður fundur í MBF-húsinum, Íslandsvegur 10. At stovna Fibromyalgi-bólk, innan karmarnar hjá Giktafelag Føroya. Filmurin „at leve med Fibromyalgi" verður vístur.
Giktafelag Føroya

HAGAFUNDUR
Hagafundur, fyri ytra part í Skálafjalli, verður leygardagin 12. februar í skúlanum í Skálafirði kl. 16.00. Skrá: Frágreiðing, roknskapur og myniskt.
Hagastýrið

KOSTUR OG GIKT
Did Nicolajsen, kostráðgevi, heldur fyrilestur í hølunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag á Glyvrum mánakvøldið 7. feb. kl. 19.00. Evni: Kostur og gikt.
Giktafelag Føroya

Húsarhaldstól

5 ÁRA GOMUL
vaskimaskina í góðum standi, til sølu fyri 1100 kr.
Tlf. 31 37 84

BORÐOVNUR TIL SØLU
Góður Kervel borðovnur v. grill til sølu.
Tlf. 31 12 35

EIMHETTA TIL SØLU
Husqvarna eimhetta til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 313738

FRYSTISKÁP
Eitt frystiskáp 340 ltr. til sølu fyri 2.000 kr. og ein frystiboks, 500 ltr. til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 44 70 71
ella 21 33 76

KOMFÝRUR TIL SØLU
Lítið brúktur Siemens komfýrur til sølu fyri 3.500 kr.
Tlf. 313738

KØLISKÁP
Eitt Savoy køliskáp til sølu, H82, b56, d59, til sølu fyri 450,- kr.
Tlf. 456667

KØLISKÁP
til sølu fyri 700 kr.
Tlf. 31 50 62

KØLISKÁP TIL SØLU!
Eitt Savoy køliskáp til sølu h. 82 b. 56 d. 59 til sølu fyri 450,- kr.
Tlf. 456667

STÁLVØSK TIL SØLU
Tvey góð stálvøsk til sølu fyri 500,- pr. stk.
Tlf. 313738

Innbúgv

BOX-SOVISOFUR
tvær góðar box-sovisofur 90x200 til sølu. Báðar eru dupultfjaðraðar og hava vøkur betrekk og pútur. Onnur er svørtmynstrut, hin er rosa/pink. Kostnaður: 950 kr. fyri hvørja.
Ringið
tlf. 314368
eftir kl. 15

BRENNIOVNUR
Petroleum turbo kr. 1.200.
Tlf. 31 50 62

BRIO BARNAVOGNUR
Combi til sølu fyri 2500 kr. Ein dupultsong 140x200, bíliga til sølu.
Tlf. 316016
ella 214884

GRØNT
vask og wc kumma til sølu.
Tlf. 31 77 14
eftir kl. 18.00

INNBÚGV TIL SØLU
Sofa og sofaborð til sølu.
Tlf. 361596 eftir kl. 18

JARNSONG
Svart-lakerað jarnsong við botni 140x200 cm. til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 316120

LEÐURSTÓLUR
Ein 2 1/2 mðr. gamal leðurstólur við fótskamli. Nýprísur 5.000,- nú 3.000,-
Tlf. 455142

LÚTAÐ DUPULTSONG
v/2 madrassum 180x200, sum nýggj, er 2 ára gomul. Nýprísur 3.800, nú 2.200 kr.
Tlf. 310068

SOFABORD
mørkt med kakler, 140x78.
Tlf. 31 77 14 bedst efter kl. 18.00

SOFASETT VIÐ BORÐI
Teak spísistovuborð bíliga til sølu.
Tlf. 44 13 99

SOVISOFA
1 m. breið, 2 m. long, brún og grá puntut, er til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 37 13 30

TEAKBORÐ
Runt teakborð við 2 plátum og seks stólar til sølu.
Tlf. 313306

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:
❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út- & sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ ……

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi

Sent hevur:

Navn: ……

Bústaður: ……

Bygd/býur: ……

Tlf.: ……

»Lýsingartorgið«
Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76,
110 Tórshavn

Til frímerki